# Espersen í essinum

**Bersøgni og provokerandi Søren Espersen var óivað hæddarpunktið á studentadegnum hjá Norðuratlantsbólkinum fríggjadagin. -Hóast Høgni Hoydal gongur og tosar á Fólkatingi sum um, at allar Føroyar standa aftanfyri hansara politikk, so vita vit politikarar væl, at hann bert umboðar ein minniluta í Føroyum, segði hann millum annað**

STUDENTADAGUR
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*



*– Hóast Høgni Hoydal gongur og tosar á Fólkatingi sum um, at allar Føroyar standa aftan fyri hansara politikk, so vita vit politikarar væl, at hann bert umboðar ein minniluta í Føroyum. Kortini vænti eg tíverri, at vanligi danin ikki veit, at sjónarmiðini hjá Høgna Hoydal umboða ein minniluta í Føroyum, og tað er sjálvsagt eitt sindur óheppið, segði Søren Espersen*

*Mynd: Símun J. Hansen*

**Christiansborg:** Á fjølbroyttu skránni hjá Norðuratlantsbólkinum stóð hann uttan iva í skugganum av so mætum nøvnum sum Anders Fogh Rasmussen, Helle Thorning Schmidt, Bertel Haarder og Connie Hedegaard. Kortini tóktist vera breið semju um, at framsøgumaðurin hjá Danska Fólkaflokkinum í uttanríkismálum, Søren Espersen, hevði bestu framløguna á studentadegnum fríggjadagin.

Hansara provokerandi og skemtiligi stílur setti veruliga lív í kjakið á Christiansborg. Gamaní vóru tað mong, sum ikki tóku undir við hansara sjónarmiðum, men kortini tóktist fólk vera á einum máli um, at Søren Espersen var hæddarpunktið. Bersøgni Søren Espersen tosaði beint frá livrini og hansara gerandismál fall í góða jørð hjá teimum føroysku og grønlendsku lesandi, ið høvdu leitað sær á Christiansborg fríggjadagin.

Framsøgumaðurin hjá Dansk Folkeparti legði út við at prika til føroyska limin í Norðuratlantsbólkinum, Høgna Hoydal.

– Hóast Høgni Hoydal gongur og tosar á Fólkatingi sum um, at allar Føroyar standa aftan fyri hansara politikk, so vita vit politikarar væl, at hann bert umboðar ein minniluta í Føroyum. Kortini vænti eg tíverri, at vanligi danin ikki veit, at sjónarmiðini hjá Høgna Hoydal umboða ein minniluta í Føroyum, og tað er sjálvsagt eitt sindur óheppið, segði hann.

Søren Espersen segði seg eisini vera troyttan av, at fólkatingslimirnir úr Føroyum og Grønlandi ofta høvdu lyndi til at leggja danir undir at føra hjálandapolitikk, tá onkur danskur politikari segði sína hugsan um innanhýsis føroysk ella grønlendsk viðurskifti.

– Tit eru altíð skjótir at leggja okkum hjálandapolitikk, tá tit meta, vit leggja okkum út í tykkara viðurskifti. Tað haldi eg vera rættiliga órímuligt, tí føroysku og grønlendsku fólkatingslimirnar hava gjøgnum tíðina sanniliga blandað seg í danskan politikk og gera tað framvegis. Eg kann bara nevna, at tað vóru føroyingar, sum tryggjaðu, at Poul Nyrup Rasmussen kundi halda á sum forsætisráðharri í 1998, vísti karismatiski politikarin á.

Søren Espersen legði afturat, at so leingi føroyingar og grønlendingar leggja seg út í danskan politikk, fór hann ikki at halda seg aftur við at siga sína hugsan um føroysk ella grønlendsk viðurskifti, um hann kendi tørv á tí.

### Málið viðurkennast

Undir kjakinum eftir uppleggið frá Søren Espersen, varð framsøgumaðurin hjá Dansk Folkeparti í uttanríkisviðurskiftum spurdur um, hvørja støðu hann hevði til, at føroyska málið skuldi viðurkennast sum minnilutamál í Danmark.

Tað eru nøkur ár síðan, at føroyska ynskið um viðurkenning av føroyska málinum sum minnilutamál í Danmark var á breddanum, men tá eydnaðist ikki at sannføra danir um eina formliga viðurkenning. Søren Espersen tóktist ikki kenna so nógv til ítøkiliga málið, men hann vissaði fyri, at hann og Dansk Folkeparti fóru at stuðla føroyska ynskinum um viðurkenning, tá málið kom á breddan aftur.

### Ikki búnir

Fleiri av teimum grønlendsku lesandi gjørdust rættiliga stoytt av sjónarmiðunum hjá Søren Espersen um grønlendskt sjálvstýri. Umboðið hjá Danska Fólkaflokkinum segði bart út, at at eftir hansara tykki, var Grønland ikki búgvið sum land at fáa sjálvstýri.

– Var eg í dag biðin um at atkvøða fyri ella ímóti grønlendskum sjálvsstýri, hevði eg við vissu trýst á reyða knøttin. Grønland hevur heilt einfalt ikki neyðuga fakliga førleikan til at fáa sjálvsstýri í dag. Millum 90-95% av arbeiðsmegini hjá tí almenna í Grønlandi eru jú framvegis danir. Tað er so ómetaliga lætt hjá limunum í Norðuratlantsbólkinum at rópa upp um sjálvstýrið á Fólkatingið, men verri gongur við at brynja Grønland til sjálvstýri. Eftir mínum tykki nýta grønlendsku umboðini á fólkatingið alt ov stóra orku til formalia heldur enn at virka fyri, at fleiri grønlendingar fáa eina útbúgving og harvið økja um fakliga førleikan í Grønlandi. Fakligi førleikin er eitt grundleggjandi krav fyri einum sjálvstøðugum Grønlandi, helt Søren Espersen fyri.

Bersøgnu sjónarmiðini hjá Søren Espersen um grønlendskt sjálvsstýrið elvdu til veruligt kjak í salinum, og bæði grønlendsk og føroysk lesandi nýttu høvi til at seta danska politikaranum uppfylgjandi spurningar. Báðir grønlendsku limirnir í Norðuratlantsbólkinum, Kuupik Kleist og Lars Emil Johansen, vístu ákærunum frá Søren Espersen aftur, og vístu á, at Grønland seinastu árini hevur munandi økt sína játtan til útbúgvingarøkið.



